**Rúsevnapolitikkur**
Ásannandi, at rúsevnamisnýtsla ávirkar arbeiðsavrikið, skal rúsevnapolitikkurin tryggja, at almenn arbeiðspláss eru rúsevnafrí.
Leiðslan á staðnum hevur høvuðsábyrgdina av, at rúsevnapolitikkurin verður fylgdur.

**Endamál**
Endamálið við rúsevnapolitikkinum er at skapa eitt trygt og gott arbeiðspláss, at fyribyrgja trupulleikum av rúsevnum og at geva starvsfólkum * møguleika - so tíðliga sum gjørligt - at koma burtur úr møguligari misnýtslu.

**Alment**
Rúsevnanýtsla skal ikki ávirka arbeiðsavrikið.
Tað er ikki loyvt at fáa sær rúsevni í arbeiðstíðini. Heldur ikki
er loyvt at selja ella bjóða starvsfólki rúsevni í arbeiðstíðini. Somuleiðis er ikki loyvt at møta til arbeiðis ávirkað/ur av rúsevni.

**Undantak**
Leiðslan kann geva loyvi til at skonkt verður við serlig høvi, t.d. í sambandi við móttøkur og onnur hátíðarhald. Við tílík høvi eigur hetta at verða gjørt við fyriliti, og eins góður møguleiki skal vera at fáa rúsfrían løg.

**Ábyrgd**
Rúsevnatrupulleikar eru ikki eitt privatmál. Tí eiga øll at taka ábyrgd og boða frá, um tey vita um rúsevnatrupulleikar hjá starvsfeløgum.

**Rúsevnatrupulleikar**
Starvsfólk við rúsevnatrupulleikum kann sjálvt venda sær til næsta fyrisetta ella

---

* Sum starvsfólk verða roknað øll, sum eru sett í starv, eisini stjórar og leiðarar
* Sum starvsfólk verða roknað øll, sum eru sett í starv, eisini stjórar og leiðarar
* Sum starvsfólk verða roknað øll, sum eru sett í starv, eisini stjórar og leiðarar
* Sum starvsfólk verða roknað øll, sum eru sett í starv, eisini stjórar og leiðarar
* Sum starvsfólk verða roknað øll, sum eru sett í starv, eisini stjórar og leiðarar
* Sum starvsfólk verða roknað øll, sum eru sett í starv, eisini stjórar og leiðarar
* Sum starvsfólk verða roknað øll, sum eru sett í starv, eisini stjórar og leiðarar
* Sum starvsfólk verða roknað øll, sum eru sett í starv, eisini stjórar og leiðarar

starvsfólkaumboð at tosa um trupulleikarnar og møguleika fyri hjálp.

Tílík samrøða er at meta sum trúnaðarmál og hevur ikki ávaring við sær.

**Vegleiðandi mannagongd:**

Niðanfyrinevnda vegleiðandi mannagongd kann nýtast, um so er, at trupulleikin ikki er so álvarsligur, at neyðugt er beinanvegin at siga starvsfólki upp ella vísa tí burtur.

**Munnlig ávaring**

Tá ið næsti fyrisetti varnast, at starvsfólk hevur rúsevnatrupulleikar, skal hann/hon skipa fyri eini samrøðu við viðkomandi um trupulleikarnar.
Endamálið við samrøðuni er at geva munnliga ávaring og tilboð um hjálp til viðgerð av trupulleikunum.

Er starvsfólk ávirkað í arbeiðstíðini, skal tann, sum varnast hetta, boða næsta fyrisetta frá. Hesin biður viðkomandi starvsfólk um at fara av arbeiðsplássinum og skipar næsta arbeiðsdag fyri samrøðu við viðkomandi um tilburðin. Tá verður munnlig ávaring givin.

Viðkomandi váttar at hava fingið ávaringina .

**Skrivlig ávaring**

Halda trupulleikarnir fram, eftir at ávaring er givin, skal næsti fyrisetti skipa fyri nýggjari samrøðu og tá geva viðkomandi starvsfólki skrivliga ávaring.

Saman við hesi ávaring skal næsti fyrisetti eisini geva tilboð um hjálp til viðgerð av trupulleikunum.
Allar ávaringar verða skrásettar í starvsskjølum starvsfólksins.
Ein ávaring er galdandi í trý ár. Eftir hetta verður hon ógildað.

---------

**Viðgerð**

Viðgerðin av rúsevnatrupulleikunum skal leggjast til rættis saman við lækna og/ella serkønari hjálp.

**Uppsøgn**

Hevur viðkomandi ikki tikið ímóti tilboði um hjálp aftan á skrivligu ávaringina, og/ella trupulleikarnir halda fram, er hetta at rokna sum uppsagnargrund.

Rúsevnatrupulleikarnir hava tá við sær, at talan verður um at siga starvsfólk úr starvi ella at vísa burtur, og hetta skal fremjast sambært mannagongdum, freistum og fráboðanarskyldum í galdandi lógum, reglugerðum og sáttmálum og starvsfólkarættarligum reglum annars.

---

* Sum starvsfólk verða roknað øll, sum eru sett í starv, eisini stjórar og leiðarar